## Rannvá úr New York til Tórshavn

Ein av teimum, sum skal framføra á Asfalt í ár, er Rannvá Jacobsen. Seinastu árini hevur hon staðfest seg sum sangarinnu og er vorðin meiri seriøs á hesum øki. Hon var ein av songkvinnunum í væl umtókta reggae/rokk bólkinum pH 5,5, og hevur spælt nógv á kaffistøðum og barrum í Havnini eins og í Danmark. Rannvá er fyri stuttum byrjað at skriva egin løg. Hesi hava verið væl móttikin, m.a. í sangskrivarakappingini hjá AME í vetur og á 15 teimum bestu. Rannvá spælir fólkakendan singer/songwriter tónleik, og á ársins Asfalt er Heðin Ziska Davidsen við á pallinum. Størsta avrikið hjá Rannvu var tó uttan iva á heysti í fjør, tá ið útvarpsstøð í Amerikanska statinum New York setti seg í samband við hana fyri at sleppa at spæla tónleik hennara. Lurtið eftir Rannvu á Myspace.com/rannvajacobsen.

## Flakavirki selt

Tá Framherji keypti partapeningin í partafelagnum Vesturvón, fylgdi flakavirkið, sum felagið átti í Sørvági, við keypinum. Men nú eiga sørvingar aftur virkið, tí partafelagið Vesturskin hevur keypt virkið frá Framherja, skrivar Vikublaðið. Tummas Henriksen, stjóri, sigur við blaðið, at tey hava keypt virkið fyri 2,6 mió. krónur. Virkið hevur arbeitt saltfisk burturav, men teir nýggju eigararnir ætla at virka annan fisk eisini, sigur stjórin.

# iða sløkkiliðið



*Sonni Johansen (t.v.) umboðar Sjóvar kommunu og Petur Jacob Petersen (t.h.) er formaður í brunanevndini vegna Nes kommunu. Í miðjuni stendur Sunleif Højgaard, sum nú er settur brunaumsjónarmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

sett prís upp á, at vit hava eina skipan, sum kemur raktum og neyðstøddum til hjálpar.

Formaðurin í brunanevndini sigur, at longu í dag er tað eitt stórt arbeiði at fyriskipa og umsita sløkkiliðið, eins og venjingar, útbúgving og annað skal haldast viðlíka.

- Økið kring Skálafjørðin veksur alsamt og við teimum ætlanum, sum liggja fyri framman, er eingin ivi um, at vit eiga at hava ein brandmeistara í fulltíðar starvi, sigur hann.

Sunleiv Højgaard hevur verið brandmaður síðan 1987 og hevur havt ábyrgdina av SKS síðan 2001. Í fjør tók hann donsku brandmeistaraútbúgvingina, "indsatsleder" hjá Dansk Beredskabsstyrelsen.

Sjálvur sigur setti brandmeistarin, at nakað av tíð fer at ganga, til arbeiðið er lagt í fastar rammur, men sum frá líður fara kommunurnar at leggja til merkis, at brunaumsjónarmaður er settur í fulltíðarstarv.

Hann sigur, at fleiri ætlanir eru í stoypiskeiðini, men enn er ov tíðliga at siga nakað um hesar.

- Eg vil tó siga so mikið, at sum tíðin líðir fara smærru bygdirnar, sum liggja longst burtur, at fáa í boði at fáa skeið í eldsløkking.

Sunleiv Højgaard sigur, at fyrsta bygdin, sum fær hetta tilboð, verður Selatrað, har alt bygdarfólkið verður boðið til skeið seinast í mai mánaða.

- Hesi skeiðini snúgva seg um, hvussu fólk skulu bera seg at, um tey skuldu verið rakt av eldi. Vit hava roynt hendan leistin í Funningi fyri eini tíð síðan, og nærum allir íbúgvarnir í bygdini møttu upp. Elsta fólkið, sum var við, var 89 og yngsta var 3. Hetta tiltakið eydnaðist sera væl, sigur Sunleiv Højgaard, sum nú er í fulltíðarstarvi hjá Skálafjarðar kommunala Sløkkiliði.



*Stjórin í KJ-Hydraulik og konan saman við Karl Staotz og konu hansara*

# Hjálp til sjálvhjálp

**Í serblaðnum um North Atlantic Fish Fair, sum er í Sosialinum í dag, er áhugaverd søga um eina hending, sum fór fram fyri 6-7 árum síðan. Serblaðið fór til prentingar mánakvøldið, og tá høvdu vit ikki fingið fatur á teimum myndum, sum vit kundu hugsað okkum til hesa greinina**

SJÁLVHJÁLP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Søgan er í stuttum, at eftir eina av teimum mongu ferðum, sum føroyingar hava verið í Rumenia við klæðum, gjørdi Kári Johannesen, sáli, sum átti KJ-Hydraulik, av at geva einum manni í Rumenia maskinurnar hjá Hydro Tech á Eiði.

Hetta vóru maskinur, sum teir tá brúktu til framleiðslu av besløgum til aliringar.

Fyritøkan á Eiði hevði framleitt besløg í nøkur ár, men torført hevði verið at fingið lønandi vinnu í hesa framleiðslu, tí kappingin var so hørð.

Heimaftur komin av eini ferð í Rumenia, gjørdi Kári av at koyra maskinurnar upp í ein lastbil og senda tveir mans niður til Rumenia við teimum.

Hann hevði stórt álit á rumenanum, Karl Staotz, og farnu árini hava víst, at maðurin sveik ikki hansara alit.

Hetta var í einum fátækum parti av landinum, sum var rakt av herviligum arbeiðsloysi.

Virksemið hjá rumenanum byrjaði í einum bilhúsi ella einum skúri, men nú fyri einum góðum ári síðan kundi hann taka í nýtslu nýggjan smiðjubygning, sum er einar 350 fermetrar stórur.

Í dag hevur hann 14-16 fólk í arbeiði, og seinastu árini hevur fyritøkan hjá honum, Karlo Tech, framleitt besløg til alivinnuna í Føroyum og okkara grannalondum. Haraftrat hevur Karlo Tech avtalu við Idé Møblar um framleiðslu av knagum og við Oilwind í Miðvági um framleiðslu av ymiskum rustfrúm.

Hendan søgan er ókend millum tey flestu og er ein søga um, hvussu hjálp til sjálvhjálp kann tæna bæði tí, sum gevur – og tí, sum fær.

Avgerðin hjá Kára Johannesen, sum doyði av sjúku 52 ára gamal í 2001, gjørdi, at nakrar familjur í Rumenia fingu eitt varandi livibreyð, samstundis sum KJ-fyritøkan framhaldandi kundi selja besløgini í kapping við aðrar.



*Kári Johannesen gav Karl Staotz maskinurnar, sum Hydro Tech átti á Eiði*